# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 20. september 2024 |
| Mál nr.: | 24/20839 |
| Málsviðgjørt: | AW |
| Ummælistíð: | 20/9-7/10-2024 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan eftirkannar |

**Kunngerð**
**um**
**býtið av bókasavnsgjaldinum**

Við heimild í § 22, stk. 3 og 5 í løgtingslóg nr. 78 frá 1. juni 2023 um bókasøvn (Bókasavnslógin) verður ásett:

**§ 1.** Bókasavnsgjaldið er gjald til rithøvund, tónaskald, týðara, upplesara, myndlistafólk og fotograf, hvørs bøkur, ljóðbøkur, e-bøkur, týðingar og listaverk, sum eru skrásett í Føroyskum Bókalista ella Lista yvir listaverk á bókasøvnum í Føroyum, sum Landsbókasavnið ger, og sum eru til láns á bókasøvnum í Føroyum.
*Stk. 2.* Bókasavnsgjaldið verður roknað eina ferð um árið og skal vera goldið í seinasta lagi 1. desember.

**§ 2.** Fyri at fáa bókasavnsgjald skal rithøvundur, tónaskald, týðari, upplesari, myndlistafólk ella fotografur vera skrásett ella skrásettur sum móttakari av bókasavnsgjaldi á Landsbókasavninum.
*Stk. 2.* Tey, ið ikki áður hava fingið bókasavnsgjald, skulu lata inn umsókn um at verða skrásett sum móttakari av bókasavnsgjaldi á serstøkum oyðublaði, ið skal vera Landsbókasavninum í hendi í seinasta lagi 30. juni. Í 2024 skal umsóknin vera Landsbókasavninum í hendi í seinasta lagi 1. november. Eru broytingar í viðurskiftunum hjá móttakara, skulu hesar eisini fráboðast Landsbókasavninum á serstøkum oyðublaði frá Landsbókasavninum.

**§ 3.** Bókasavnsgjaldið verður latið fyri bøkur sambært § 5, ljóðbøkur og e-bøkur sambært § 6, týðingar sambært § 7 og listaverk sambært § 8, ið tann 31. desember árið fyri vóru skrásett í Føroyskum Bókalista ella í Lista yvir listaverk á bókasøvnum í Føroyum, og sum vóru til láns á fólkabókasøvnum, skúlabókasøvnum, bókasøvnum á hægri útbúgvingarstovnum, Námi og Landsbókasavninum, tó undantikið bøkur á Landsbókasavninum, ið ikki eru til útláns, sbr. tó § 10, stk. 2.

**§ 4.** Rithøvundar, tónaskøld, týðarar, upplesarar, myndlistafólk og fotografar fáa lutir í upphæddini, ið er sett av til

bókasavnsgjald á løgtingsfíggjarlógini sbr. §§ 5-8.
*Stk. 2.* Fyri prentað og útgivin verk verður eitt eintak av eini bók, ið er tøk á bókasøvnum í Føroyum, roknað sum ein lutur.
*Stk. 3.* Fyri ljóðbøkur og e-bøkur, sum eru tøkar á netinum á bókasøvnum í Føroyum, verður bókasavnsgjaldið roknað sum 24 lutir av eini prentaðari og útgivnari bók, ið er tøk á bókasøvnum í Føroyum.
*Stk. 4.* Fyri listaverk, sum er tøkt á bókasøvnum í Føroyum, verður bókasavnsgjaldið roknað sum 12 lutir av eini prentaðari og útgivnari bók, ið er tøk á bókasøvnum í Føroyum.
*Stk. 5.* Fyri myndprýðing av bókum, hava myndlistafólk og fotografar rætt til bókasavnsgjald, tá myndirnar eru í minsta lagi 40% av verkinum, eisini tá talan er um ljóðbøkur og e-bøkur.
*Stk. 6.* Ritstjórar kunnu fáa bókasavnsgjald fyri bøkur, um sjávstøðuga íkastið hjá ritstjóranum til verkið er í minsta lagi 17 síður.
*Stk. 7.* Bókasavnsgjald til rithøvund, tónaskald, týðara, upplesara, myndlistafólk, ella fotograf har upphæddin er undir kr. 500, verður ikki útgoldið, sbr. § 22, stk. 3 í løgtingslógini.

**§ 5.** Sum bók verður roknað hvørt sjálvstøðugt bind av prentaðum og útgivnum verki, sum hevur í minsta lagi 17 síður, og ljóðbók, ið er givin út á fløgu, og sum er skrásett í Føroyskum Bókalista.
*Stk. 2.* Bókasavnsgjaldið fyri bøkur verður roknað soleiðis:
1) Móttakari fær 1 lut í bókasavnsgjaldinum fyri hvørt eintakið av bók, ið hevur ein rithøvund, tónaskald, myndlistafólk ella fotograf.
2) Móttakari fær 1/2 lut í bókasavnsgjaldinum fyri hvørt eintakið av bók, ið hevur tveir rithøvundar, tónaskøld, myndlistafólk ella fotografar.
3) Móttakari fær 1/3 lut í bókasavnsgjaldinum fyri hvørt eintakið av bók, ið hevur tríggjar rithøvundar, tónaskøld, myndlistafólk ella fotografar.
4) Lutur í bókasavnsgjaldinum verður ikki roknaður fyri bók, ið hevur fýra ella fleiri rithøvundar, tónaskøld, myndlistafólk ella fotografar.
5) Harafturat verður 1/2 lutur í bókasavnsgjaldinum latin fyri upplesing fyri hvørja bók. Eru fleiri enn tríggir upplesarar av eini bók, verður bókasavnsgjald ikki latið.

**§ 6.** Sum ljóðbók ella e-bók verður roknað hvør sjálvstøðug eind av útgivnum verki, ið svarar til í minsta lagi 17 síður í prentaðari útgávu, ið er tøk á netinum á føroysku bókasøvnunum, og sum er skrásett í Føroyskum Bókalista.
*Stk. 2.* Bókasavnsgjaldið fyri ljóðbøkur og e-bøkur á netinum verður roknað soleiðis:
1) Móttakari fær 24 lutir í bókasavnsgjaldinum fyri hvørja ljóðbók ella e-bók, ið hevur ein rithøvund, tónaskald, myndlistafólk ella fotograf og har myndprýðingin er ein týðandi lutur í bókini.
2) Móttakari fær 12 lutir í bókasavnsgjaldinum fyri hvørja ljóðbók ella e-bók, bók, ið hevur tveir rithøvundar, tónaskøld, myndlistafólk ella fotografar.
3) Móttakari fær 8 lutir í bókasavnsgjaldinum fyri hvørja ljóðbók ella e-bók, bók, ið hevur tríggjar rithøvundar, tónaskøld, myndlistafólk ella fotografar.
4) Harafturat verða 12 lutir í bókasavnsgjaldinum latnir fyri upplesing fyri hvørja bók. Eru fleiri enn tríggir upplesarar av eini bók, verður bókasavnsgjald ikki latið.

**§ 7.** Sum týðing verður roknað hvørt sjálvstøðugt bind av prentaðum og útgivnum týddum verki, sum hevur í minsta lagi 17 síður, og sum er skrásett í Føroyskum Bókalista.
*Stk. 2.* Bókasavnsgjaldið fyri týðingar verður roknað soleiðis:

1) Móttakari fær 1/2 lut í bókasavnsgjaldinum fyri hvørt eintakið av eini týðing.
2) Móttakari fær 1/3 lut í bókasavnsgjaldinum fyri hvørt eintakið av týðing, ið hevur tveir týðarar.
3) Móttakari fær 1/6 lut í bókasavnsgjaldinum fyri hvørt eintakið av týðing, ið hevur tríggjar týðarar.
4) Lutur í bókasavnsgjaldinum verður ikki roknaður fyri týðing, ið hevur fýra ella fleiri móttakarar.

*Stk. 3.* Fyri týddar myndabøkur fær týðarin 1/3 lut í bókasavnsgjaldinum, tá ið teksturin er týðandi partur av verkinum.
*Stk. 4.* Er í týddari bók eisini upprunatekstur, kann 1/1 lutur verða latin, tá hesin upprunatekstur er týðandi partur av bókini.
*Stk. 5.* Bókasavnsgjaldið fyri týddar ljóðbøkur og e-bøkur verður roknað soleiðis:

1) Móttakari fær 12 lutir í bókasavnsgjaldinum fyri hvørja týðing, ið hevur ein týðara.
2) Móttakari fær 6 lutir í bókasavnsgjaldinum fyri hvørja týðing, ið hevur tveir týðarar.
3) Móttakari fær 3 lutir í bókasavnsgjaldinum fyri hvørja týðing, ið hevur tríggjar týðarar.
4) Lutur í bókasavnsgjaldinum verður ikki roknaður fyri týðing, ið hevur fýra ella fleiri móttakarar.

*Stk. 6.* Fyri týddar myndabøkur fær týðarin 6 lutir í bókasavnsgjaldinum, tá ið teksturin er týðandi partur av verkinum.
*Stk. 7.* Er í týddari bók eisini upprunatekstur, kunnu 24 lutur verða latnir, tá hesin upprunatekstur er týðandi partur av bókini.

**§ 8.** Fyri listaverk, ið eru skrásett í Lista yvir listaverk á bókasøvnum í Føroyum, verður latið bókasavnsgjald, ið verður roknað soleiðis:

1) Móttakari fær 12 lutir í bókasavnsgjaldinum fyri hvørt verk, ið hevur eitt myndlistafólk.
2) Móttakari fær 6 lutir í bókasavnsgjaldinum fyri hvørt verk, ið hevur tvey myndlistafólk.
3) Móttakari fær 2 lutir í bókasavnsgjaldinum fyri hvørt verk, ið hevur 3 myndlistafólk.
4) Lutur í bókasavnsgjaldinum verður ikki roknaður fyri listaverk, ið hava fýra ella fleiri myndlistafólk.

**§ 9.** Landsbókasavnið umsitur bókasavnsgjaldið sambært løgtingslóg um bókasøvn.
*Stk. 2.* Landsbókasavnið kunnar um tíðarfreistir og annað í sambandi við bókasavnsgjaldið í góðari tíð.
*Stk. 3.* Landsbókasavnið almannakunnger hagtøl, ið vísa árliga býtið av bókasavnsgjaldinum.
*Stk. 4.* Landsbókavørðurin tekur støðu til ivamál og ger av, nær talan er um móttakara eftir § 2 og um bók, ljóðbók, e-bók, týðing ella listaverk eftir §§ 5-8.
*Stk. 5.* Avgerð sambært hesi kunngerð kann kærast til landsstýrisfólkið.

**§ 10.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Bókasavnsgjaldið fyri ljóðbøkur, e-bøkur og listaverk verður fyri 2024 latið fyri verk, ið tann 1. november 2024 vóru skrásett í Føroyskum Bókalista ella í Lista yvir listaverk á bókasøvnum í Føroyum, og sum vóru til láns á fólkabókasøvnum, skúlabókasøvnum, bókasøvnum á hægri útbúgvingarstovnum, Námi og Landsbókasavninum, tó undantikið bøkur á Landsbókasavninum, ið ikki eru til útláns.

Almanna- og mentamálaráðið, 20. september 2024

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen